## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig. Seint um kvøldið frískar hann vindin av landsynningi.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, um kvøldið minni vindur. Stundum regn ella mjørki og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, stundum upp í ein strúk. Sólglottar, men eisiini okkurt ælið. Hitin millum 13 og 17 stig.

# Súsanna, Ria og Hans Tórgarð heiðrað

**Ólavsøkudag fingu tey trý systkini Súsanna, Ria og Hans Tórgarð handað Listavirðisløn Miðlahúsins fyri teirra arbeiði og leiklut innan føroyskan sjónleik**

LISTAVIRÐISLØN

*Ria, Hans og Súsanna Tórgarð fingu Listavirðisløn Miðlahúsins í ár*
*Mynd Beinta Haraldsen*

Tað var Jan Müller, forstjóri í Miðlahúsinum, sum handaði teimum virðisløninа uppá tilsamans 75.000 kr. Tiltakið fór fram við standmyndina av Nólsoyar Páll í Vágsbotni stutt eftir, at tingið varð sett. Grundgevingin fyri at lata Tórgarðssystkini fáa virðisløninа var henda:

"Systkini Súsanna, Ria og Hans Tórgarð fáa Listavirðisløn Miðlahúsins 2009 fyri teirra stóra og slóðbrótandi virksemi fyri føroyska leiklist. Tey hava í mong ár og mangan undir truplum umstøðum verið framúr virkin við sjónleiki, leikstjórn og leikriti, og listarliga arbeiði teirra hevur havt stóran týdning fyri føroyska leiklist og føroyskan samleika. Við stórum ídni, góðum sjónleikaragávum og málsligum hegni hava tey trý saman við mongum øðrum innan leiklistaøkið verið við til at flyta føroyska leiklist fram á altjóða støði. Súsanna, Ria og Hans Tórgarð hava við leiklistini givið føroysku áskoðarafjøldini ríkar og ógloymandi upplivingar, samstundis sum tey hava verið við til støðugt at menna føroyskan sjónleik sum listagrein í Føroyum."

Stuðla virðisløninі hava Tórshavnar Kommuna, Kvívíkar Kommuna, Føroya Banki,

Føroya Tele, Hotel Føroyar, Poul Hansen heilsøla og Tryggingarfelagið LÍV.

Lesið eisini Vikuskiftissosialin, tá vit hava meira um virðisløninа.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 995 hPa. millum Íslands og Føroya fer vestureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1003 hPa. yvir Norðsjónum fer í landnyrðing og dýpist.

**Komandi nátt:**
Ein veikur hátrýstryggur yvir Føroyum stendur mestsum í stað komandi samdøgur.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/07 kl. 06⁰⁰ – 22/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 21/07 kl. 06⁰⁰ – 22/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 32 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 21. juli | Mánin næstur jørðini |
| 28. juli | Fyrra kvarter |
| 4. aug | Mánin longst frá jørðini |
| 6. aug | Fullmáni |

Kelda: Almanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. juli | 02:25 | 14:49 | 01:25 | 13:49 | 01:40 | 14:04 | 04:25 | 16:49 | 05:25 | 17:49 | 00:40 | 13:04 | - | 12:04 | 02:40 | 15:04 | 03:40 | 16:04 | 02:10 | 14:34 | 03:25 | 15:49 |
| 31. juli | 03:14 | 15:39 | 02:14 | 14:39 | 02:29 | 14:54 | 05:14 | 17:39 | 06:14 | 18:39 | 01:29 | 13:54 | 00:29 | 12:54 | 03:29 | 15:54 | 04:29 | 16:54 | 02:59 | 15:24 | 04:14 | 16:39 |
| 1.aug | 04:04 | 16:29 | 03:04 | 15:29 | 03:19 | 15:44 | 06:04 | 18:29 | 07:04 | 19:29 | 02:19 | 14:44 | 01:19 | 13:44 | 04:19 | 16:44 | 05:19 | 17:44 | 03:49 | 16:14 | 05:04 | 17:29 |
| 2.aug | 04:54 | 17:18 | 03:54 | 16:18 | 04:09 | 16:33 | 06:54 | 19:18 | 07:54 | 20:18 | 03:09 | 15:33 | 02:09 | 14:33 | 05:09 | 17:33 | 06:09 | 18:33 | 04:39 | 17:03 | 05:54 | 18:18 |
| 3.aug | 05:43 | 18:06 | 04:43 | 17:06 | 04:58 | 17:21 | 07:43 | 20:06 | 08:43 | 21:06 | 03:58 | 16:21 | 02:58 | 15:21 | 05:58 | 18:21 | 06:58 | 19:21 | 05:28 | 17:51 | 06:43 | 19:06 |